Navn og persónnr. (spjaldur)

# [til börn]
# Samtykki til at geva víðari heilsuupplýsingar til gransking og goyma lívfröðiligt tilfar frá sjúklingum á Ríkissjúkrahúsinum.

Í sambandi tína viðgerð á Ríkissjúkrahúsinum vilja vit fegin goyma royndir frá tær í einum lívfröðibanka. Royndirnar kunnu í framtíðini verða nýttar til starvsstovugranskingar innan ta sjúku, tú hevur, til at nágreina samhangini millum arv, umhvörvi, lívshátt, ígerðir og aðrar sjúkur, og so ta sjúku, tú hevur. Fyri at kunna nýta starvstovugreiningarnar best möguligt vilja vit eisini fegin nýta upplýsingar úr tíni sjúkradagbók um tína sjúku/sjúkuavgerðan. Endamálið er at betra vitan og sjúkuviðgerð í sambandi við sjúklingar við somu sjúku sum tú.

Allar granskingarverkætlanir, ið nýta royndirnar í lívfröðibankanum, skulu Vísindasiðseminevndin góðkenna eins og tær skulu fráboðast Dátueftirlitinum.

Upplýsingarnar um sjúku tygara, lýstar omanfyri, vilja somuleiðis verða partur av tí granskararnir greina. Upplýsingarnar verða nýttar soleiðis, at samleiki tygara sæst ikki (verða navnleysar)

---

Loyvt verður, at blóð og annað lívfröðiligt tilfar verður goymt til seinni vísindaliga nýtslu innan mín sjúkuflokk/mína sjúkuavgerð.

Ja ☐ Nei ☐

Um tú seinni angrar og ikki longur vilt luttaka, skal avgerðin skrivast niður. Tú skalt so útfylla eitt oyðublað ”Dit væv, dit valg”, sum skal sendast til Vevnaðarnýtsluskráseting Heilsustýrisins. Starvsfólkini á sjúkrahúsinum kunnu hjálpa tær við tí. *Tú kanst angra uttan, at tað ávirkar tína viðgerð nú ella seinni.*

Dagf.: ______________________ Undirskrift: ______________________

Móttikið váttanina hevur: ______________________

**Vinaliga gev starvsfólkunum ta útfyltu váttanina**

**24. november 2015**

**Upplýsing til börn: Gransking til gagns fyri komandi sjúklingar**

Vit spyrja her um tú loyvir, at vit goyma lívfröðiligar royndir frá tær, so vit seinni kunnu kanna órinsverjuna hjá kroppi tínum mótvegis ígerðum.

Á Ríkissjúkrahúsinum hava vit stovnað ein lívfröðibanka, sum er ein stórur frystari, har vit kunnu goyma blóðroyndir - og kanska spýtt- og skarnsroyndir frá sjúklingum. Royndirnar fara seinni at verða nýttar í granskingarverkætlanum, so meiri vitan fæst um sjúklingar, ið hava stóran vanda fyri at fáa ígerðir, ella longu hava fingið álvarsliga ígerð.

Innsavnaðu royndirnar verða kannaðar á eini starvsstovu. Har verður kannað ymist viðvíkjandi sjúklinginum sjálvum (ílegur, eggjahvítaevni, og evnaskifti) og teim bakterium og lívverum, ið eru í royndunum. Vit vilja fegin hava nýggja vitan um órinsverjuna hjá kroppinum og ígerðir. Fyri best möguligt at kunna nýta starvsstovugreiningarnar vilja vit eisini fegin nýta upplýsningar úr tíni sjúkudagbók um sjúkuna hjá tær/sjúkuavgerðanina hjá tær.

Tær royndir, tú gevur PERSIMUNE-lívfröðibankanum hava týdning fyri arbeiðið at menna og betra viðgerð til gagns fyri komandi sjúklingar. Tað, at tú velur at luttaka í lívfröðibankanum fær ikki nakran beinleiðis týdning fyri tína egnu viðgerð.

Blóðroyndirnar til PERSIMUNE-lívfröðibankan verða tiknar samstundis sum aðrar blóðroyndir, ið kortini skulu takast og tú fært tí ikki eyka prik. Blóð verður fylt í trý smá rör (2 x 9 ml og 1 x 3 ml), og tann lítla nögdin hevur ongan týdning fyri kroppin hjá tær.

Blóðroyndin – og möguliga spýtt- og skarnsroyndir – verða tiknar, tá tú gevur loyvi (samtykki), aftur eftir 3 - 6 mánaðir og so eina ferð um árið, so leingi tú ert í viðgerð á Ríkissjúkrahúsinum.

Starvsstovugreiningar av royndunum fara at fara fram á Ríkissjúkrahúsinum ella hjá okkara samstarvsfelagum í öðrum londum í Evropa.

Vit arbeða við royndunum og goyma tær eftir reglum hjá Dátueftirlitinum og vit fara væl um allar persónligar upplýsingar. Áðrenn vit nýta royndirnar úr lívfröðibankanum, skulu vit eisini hava góðkenning frá Vísindasiðsemisnevndini og Dátueftirlitinum.

Tað er sjálvboðið um tú luttekur, og títt val fer á ongan hátt at ávirka viðgerð hjá tær nú ella seinni. Um tú velur at luttaka og seinni angrar, skal tín avgerð skrivast niður. Tú skalt so útfylla eitt oyðublað "Dit væv, dit valg", sum skal sendast til Vevnaðarnýtsluskráseting Heilsustýrisins. Starvsfólkini á sjúkrahúsinum kunnu hjálpa tær við tí.

*Takk* fyri, at tú gavst tær stundir at lesa hesa kunning og umhugsar um tú vilt luttaka í lívfröðibankanum.

Um tú vilt luttaka, og vit sleppa at goyma royndir frá tær í PERSIMUNE-lívfröðibanka, skalt tú útfylla og undirskriva váttanina á baksíðuni (**Samtykki til at geva víðari heilsuupplýsingar til gransking og goyma lívfröðiligt tilfar frá sjúklingum á Ríkissjúkrahúsinum**).

Vinaliga

Starvsfólkini í PERSIMUNE